# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-132_1.3
dags. 10-02-2011

**Innlendismálaráðið**
**Att: Elsa Østergaard, ráðgevi**

imr imr.fo

***Viðv.: Tygara mál: 11/00005-2 um uppskot til løgtingslóg um bygging av bygningum o.a. (Byggilógin)***
Felagið hevur móttikið uppskotið 17-01-2011 og er tað viðgjørt á stýrisfundi 08-02-2011.

Felagið hevur hesar viðmerkingar til ítøkiligu ásetingarnar í uppskotinum.

***§4.** Kommunan kann, við góðkenning frá landsstýrismanninum, í ávísum førum, loyva frávik frá ásetingunum í hesi lóg.*

Tað er óheppi at lógin heimilar byggimyndugleikanum/kommununi frávik uttan at tað í sjálvum tekstinum greitt verður sagt hvørji øki ella evni hesi frávik skulu galda fyri.
Í viðmerkingunum til lógina verða tvey dømi lýst:

a) Frávik tá talan er um friðaðar bygningar.
b) Frávik tá talan er um t.d. byggistig í ávísari útstykking vísandi til smærri útstykkingar.

Til pkt. a kann viðmerkjast at bygningar kunnu friðast sambært tveimum lóggávum, antin sambært Byggi- og býarskipanarlógini, ella sambært Lógini um fornminni. Sambært Byggi- og býarskipanarlógini hevur kommunan heimild at broyta ásetingar í einhvørkjari byggisamtykt, ella í byggisamtykt at hava ásett frávik har møguleikar tá gevast fyri tillagingum.

Tað framgongur ikki í viðmerkingunum hvat slag av friðing talan er um, og letur tað seg m.a. ikki gera hjá kommunalum myndugkleika at geva frávik til Lógina um fornminni, ið verður umsitin av Føroya Fornminnissavni.

Til pkt. b kann viðmerkjast at frávik innan t.d. byggistig er upp á sítt pláss fyri at kommunan kann geva ávísar tillagingarmøguleikar til borgaran tá talan í førum kann vera um serstaka bygging ella serstakt øki har frávik til mest loyvda byggi- ella nýtslustig kann gangast á møti.

*§7. Um tíðaráseting til bygging og endurnýggjan ella leingjan av byggiloyvi, sum er falli fyri tíðarfreist.*

Til stk. 6 kann viðmerkjast at rætt er at freist kann ásetast fyri nær ein bygging skal verða liðug. Um hetta skal standa í byggiloyvinum kann verða ivi um, tá vanligt er at umsókn um bygging hevur við sær at byggiharrin ætlar at fullføra byggingina innan fyri rímuliga tí og enntá í stigum. Harafturímóti vil ein freist fyri liðuggerð kunna taka seg upp eftir at bygging er steðga upp í longri tí t.d. í hálvt ella heilt eitt ár ella meira. Fyrst kann sigast at tað til hesa grein eigur at verða sett ein ávís tíð fyri, hvussu leingi eitt byggiarbeiði kann liggja stilt t.d. í hálvt ella heilt ár.

Næst er so hvørjir møguleikar byggimyndugleikin hevur at fáa bygging lidna, ið hevur ligið still í longri tí, og her fyrst við at áseta nevndu freist. Gongur hetta ikki, hevur byggimyndugleikin ikki – sambært § 7 ella øðrum ásetingum í lógini – nakra heimild at fáa bygningsverkið liðugt. Hugsað verður í slíkum førum mestan um høvuðskonstruktión, tekju, vindeygu og innilokan v.m.

Verður hugt eftir donsku byggilóggávuni og byggisamtyktina fyri Tórshavnar Kommunu, so hava báar eina áseting har byggimyndugleikin / kommunan kann krevja bankaveðhald ella aðra trygd veitta til liðuggerð, og kann byggimyndugleikin tá sjálvur seta í verk tiltøk til liðuggerð í mun til veittu trygd.

*§8. Um byggiloyvi har eingin góðkend byggisamtykt er galdandi.*

Mett verður at tað er óheppi at geva byggiloyvi í førum har eingin byggisamtykt er samtykt ella galdandi. Sjálvt um grein 8 vísir til at treytirnar í grein 5 stk. 2 eru galdandi í slíkum førum, kunnu spurningar setast til heimildir hjá byggimyndugleikanum at gera aðrar greinar enn nevndu grein 5 stk. 2 galdandi – har møguleikin er at onnur ivamál kunnu stinga seg upp seinri. Her kunnu ósemjur og møguligar rættarligar loysnir vísa seg ikki at kunna fáast upp á pláss, tá eingin góðkend byggisamtykt er galdandi annað enn tað sum verður ásett sambært grein 5. stk. 2.

Umhugsast kann um frægari loysn ikki er at kommunan í slíkum førum skal gera serstaka byggisamtykt og ásetingar fyri ávísa øki, og í tí samtyktini annars vísa til almennu byggisamtyktina fyri kommununa.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo